# Kappsigling á Skálafjørðinum

KAPPSIGLING
*Tíðindaskriv*

Árliga kappsiglingin hjá Lions Club Eysturoy verður nú sunnudagin. Hetta er 34. árið á rað, at felagið skipar fyri kappsiglingini. Millum 30 og 40 bátar plaga at sigla kapp á Skálafjørðinum.

Byrjað verður sunnudagin kl. 15. Siglt verður inn eftir ella út eftir fjørðinum, alt eftir hvussu ættin er. Málið verður við høvuðspierin í Runavík.

Aftan á siglingina fáa luttakararnir, sum siður er, kaffi og pannukøkur.

Tríggir teir fremstu bátarnir fáa steyp, umframt at vinnarin fær ferðasteypið í varðveitslu.

Tey, ið ætla sær at verða við í kappsiglingini, kunnu ringja til Símin Rasmussen á Strondum, tlf. 447165, ella John Rasmussen á Strondum, tlf. 448641. Freistin at tekna seg er úti leygardagin kl. 12.

Í sambandi við siglingina selur Lions Club Eysturoy lutaseðlar. Ágóðin fer til vælgerandi endamál í Eysturoynni. Peningur er m.a. latin til Eysturoyarsøgu, fornminnir og skótaarbeiði í oynni.

# Kyndil brynjar seg

HONDBÓLTUR
*Tíðindaskriv*




Eftir eitt heldur soltið kappingarár í fjør er Kyndil nú rættiliga farið í gongd við, at fyrireika seg til komandi kappingarár. Umframt at bæði besta kvinnuliðið og besta mansliðið hava fingið leikarar, leitar felagið sær eftir peningi.

Og nú hava viðhaldsfólkini møguleika at stuðla felagnum fíggjarliga. Tað ber nú til hjá øllum áhugaðum at stuðla Kyndli fíggjarliga. Hetta kann lata seg gera við at venda seg til skrivaran í felagnum, Niels Nattestad. Møguleiki er at flyta peningarnar fast eina ferð um mánaðin, men eisini ber til at flyta eitt gjald einaferð. Møguleiki er at velja millum 50, 100 og 150 krónur at flyta um mánaðin, men tað eisini lata seg gera, at sjálv/ur velja eina upphædd at stuðla felagnum við.

# Heilsufremjandi átak á Tjaldurs Apoteki

HEILSA
*Tjaldurs Apotek*




Apotekið fer við hesum at geva viðskiftafólki møguleika at kanna seg fyri ávísar sjúkur.

Hetta eru sjúkur, ið gera nógv um seg í vælferðarsamfeløgum – eisini tí føroyska.

Talan er um sukursjúku (diabetes typa 2), hjartasjúkur, sjúkur í blóðrenslinum, astma og ovurviðkvæmi (allergi).

Við hesum átaki vil apoteki ráðgeva fólki og hvat kann gerast fyri at fyribyrgja sjúkunum.

Hetta heilsufremjandi átakið er til gagns fyri øll, ið vilja vita meiri um heilsustøðu sína og gera nakað fyri at betra hana.

Apotekið hevur ásett ein dag, har fólk kunnu støkka inn á gólvið og gera mátingar av ymsum slagi.

# Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu og hjálp tá ið góða mamma, verðmamma og omma okkara

**Sylmai Poulsen**
**Skopun**

andaðist og varð jarðað.

Takk til prest, sangarar, kirkjutænarar og gravarar, og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.

Takk øll tit mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Guðny, Sigurd, Eyðbjørn og Kristbjørg v/ fam.**

# Tøkk

Á henda hátt vilja vit bera eina hjartans tøkk til øll tykkum, sum vístu okkum samkenslu, tá okkara elskaði sonur, beiggi og pápi

**Jákup Joensen**
føddur 5. juni 1972

so brádliga varð tikin heim tann 1. august 2002 einans 30 ára gamal.

Eisini øllum tykkum, sum av eintingum tóku tykkum av teimum praktisku lutunum í sambandi við jarðarferð og ervi, vilja vit takka so inniliga.

Mátti Jesus signa tykkum so ríkiliga og varðveiti tykkum.

*Familjunnar vegna*
**Súsanna og Jákup**

# Føroyakvøld á Skála sunnukvøldið

FØROYAKVØLD
*Tíðindaskriv*

Í summar hevur verið skipað fyri føroyakvøldum ymsastaðni í Eysturoynni. Tey kvøldini, sum higartil hava verið, hava verið væl eydnað og gestirnir hava verið væl nøgdir. Kvøldini eru bæði ætlað útlendingum og føroyingum.

Nú er so tíðin komin til at tiltakið skal verða í bygdasalinum í Ítróttarhøllini á Skála. Hetta kvøldið verður sunnukvøldið 18. august.

Á skránni verður eitt breitt úrval av føroyskum mati, so gestirnir fáa etið seg mettar og roynt ymiskan traditionellan føroyskan mat. Snældan fer at sýna fram teirra nýggjastu og spennandi klædnasnið, og eisini verða málningar og ymiskt handverk, sum m.a. er virkað úr ull sýnt fram. Av pallinum hoyra gestirnir ymiskt um føroyska samfelagið, søgu og mentan. Sangframførslur verða og eisini felagssangur. Kvøldið endar við eini dansiframførslu, sum Eiðis Dansifelag skipar fyri og gestirnir sleppa eisini uppí ringin at enda.

Kvøldið byrjar klokkan 20.00 og atgongumerkini, sum kosta 250 krónur, kunnu bert keypast í forsølu. Sølustøðini eru á kunningarstovuni í Runavík og á Kafeteria í ítróttarhøllini á Skála. Og longu eru fleiri atgongumerkir seld t.d. hevur eitt íslendskt kór á 28 fólk keypt atgongumerkir.

# Illgruni um ILA í Írlandi

FISKASKJÚKA
*Jógvan Hugo Gardar*

Kanningar av sílum í einum alibrúki í Clew Bay, County Mayo, á vesturstrond Írlands hava vakt illgruna um, at ILA kann vera komið til Írlands. Royndir av sílunum eru nú sendar til Noregs til kanningar, skrivar Intrafish.com.

Royndirnar vórðu tiknar í samband við tøku, og tað rakta alibrukið verður tómt hesa vikuna.

Umboð fyri írsku alararnar siga, at eingin fiskur var vorðin sjónliga súkur, men at royndirnar vístu, at ILA-virusið eftir øllum at døma er í fiskinum.



# Páll smíðar nýggja sosiallóg



*Páll á Reynatúgvu lovar eina nýggja sosiallóggávu í hesum valskeiðnum.*
*Mynd: Finnur Justinussen*

FORSORGARLÓGIN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Verandi forsorgarlóg ger mun á giftum og ógiftum og hon kostaði landskassanum í fjør 8,2 milliónir í veitingum til 276 ógift foreldur, sum ikki fingu smábørn síni ansaði og tí mátti siga starv frá sær fyri at vera heima og ansa eftir børnunum.

Páll á Reynatúgvu, landstýrismaður í almannamálum er greiður yvir trupulleikan og hann liggur ikki á løtu síðuni fyri at koma trupulleikanum til lívs.

-Undir valstríðnum varð ført fram, at vit skulu hava eina nýggja sosiallóggávu og longu í heyst verður fyrsti partur av hesi lagdur fyri tingið. Tá fara vit at leggja eitt uppskot um nýggja barnaforsorgarlóg fyri tingið. Hetta mál var eisini frammi í seinasta valskeiði, og tá var serliga ósemja um hvør skuldi hava ábyrgdina av barnaverndarøkinum. Barnaforsorgarlógin er bara fyrsti parturin. Nýggja samgongan fer at arbeiða hart fyri at fáa eina nýggja sosiallóg í hesum valskeiðnum og eg eri vísur í at tað fer at eydnast, málið er í hvussu er greitt, sigur Páll á Reynatúgvu.

-Vit fara at gera eina sosiallóg, sum er lagað eftir føroyskum viðurskiftum, eftir teimum resoursum sum føroyingar eiga. Men samstundis verður hendan lóg ikki lagað soleiðis at vit líkjast burturúr hinum norðurlondunum á sosiala økinum. Tað skal ikki vera ótryggari at búgva í Føroyum enn aðrastaðni, sigur hann.

## Hornasteinur

-Sosial trygd er ein av hornasteinunum í okkara samfelag. Vit hava brúk fyri eini forsorgarlóg, men samfelagið er siðsøguliga nógv broytt síðan forsorgarlógin kom í gildi fyri nógvum árum síðan. Tá høvdu vit ikki sosialatrygd og samhaldsfesti í samfelagnum, sum vit hava tað í dag. Fyrr var tað skomm at verða bundin av eini almennari veiting. Hetta er tíbetur broytt, sigur Páll á Reynatúgvu.

Tað hevur verið ført fram, at ein máti at fáa mannamunin millum gift og ógift foreldur burtur úr forsorgarlógini er at strika grein tvey í forsorgarlógini, sum sigur, at hjún hava uppihaldsskyldu mótvegis hvørjum øðrum?

-Grein 2 í forsorgarlógini er eitt úrslit av gamlari siðvenju, tá tað var heilt náttúrligt at hjún høvdu uppihaldsskyldu mótvegis hvørjum øðrum í einum samfelag sum sær heilt ørvísi út enn í dag. Tíðin er komin, har vit fara at broyta hetta prinsippið, men hvussu vit í samgonguni fara at broyta hetta veit eg ikki heilt enn, sigur hann.

-Her er talan um ein mismun. Hjá giftum hyggur tú eftir inntøkum og útreiðslum og ger síðan eina tørvsmeting. Hjá sambúgvandi hyggur tú bara eftir útreiðslunum og ger síðan tørvsmetingina og tá fær tú í flest førum eina heilt aðra mynd, sigur hann.

-Men tað er ikki bara sum so at strika uppihaldsskylduna. Hetta kemur at kosta samfelagnum hópin av pengi. Hvussu nógv veit eg ikki enn. Tá prátið um at gera allar fólkapensionistar sum stakar persónar var frammi vóru útrokningar gjørdar. Her varð komið fram til, at hetta fór at kosta samfelagnum millum 70-80 milliónir krónur um árið, sigur Páll á Reynatúgvu.

## Fyri fólk í neyð

Verandi forsorgarlóg gevur eisini sambúgvandi, sum samanlagt ikki eru í neyð, møguleika at fáa pening um tey ikki fáa børnini ansaði?

-Øll sosiallóggáva eigur at vera fyri fólk, sum eru í neyð. Eg veit ikki ordiliga um vit heilt fáa vart okkum fyri at ikki onkur moralskt misnýtir lógina. Men grundreglan er, at forsorg er fyri fólk, sum veruliga hava tørv á hjálp, sigur Páll á Reynatúgvu.

-Eg haldi tað skal vera fult gjøgnumskygni í forsorgarlógini, sigur hann.

-Samgongan hevur eisini sett sær fyri at leingja um rættin til at halda barsilsfrí til eitt ár. Sum er hevur pápin rætt til tvær vikur og mamman 26 vikur. Enn eru vit ikki komnir á mál við tí fíggjarliga partinum. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum í stóran mun eisini vara av hesum málinum. Longri barsislfarloyvi sama við øktum ansingartilboði hevði lætt um hjá forsorgarlógini, sigur Páll á Reynatúgvu.


# Fíggjarfólk

**Søkt verður eftir fíggjarfólki til raksturin av innkrevjingarskipanini hjá Vágatunlinum og aðrar uppgávur í sambandi við virksemið hjá felagnum, herundir bókhald v.m.**

**Førleikakrøv**

Tann rætti umsøkjarin
- hevur fíggjarliga útbúgving so sum HD, merkonom ella aðra hóskandi útbúgving
- hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur royndir frá arbeiðsmarknaðinum
- hevur kunnleika til føroyskt og enskt mál

**Lønar og setanartreytir**

Miðað verður ímóti at seta starvið 1. september 2002, ella eftir nærri avtalu. Løn og setanartreytir annars eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen á telefon 350200 ella teldupost drh@tunnil.fo.



Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. august 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu sendast til:

Vágatunnilin p/f
Postboks 1010
110 Tórshavn

VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postboks 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Fax 350201
www.tunnil.fo